## Sær svart út hjá Svøríki

Portugal tók av møguleikanum, sum Danmark gav teimum fyrr um kvøldið, tá Danmark vann 1-0 á Svøríki í Parkini í Keypmannahavn. Portugal vann á heimavølli 3-0 ímóti Ungarn. Støðan í hálvleikinum var 1-0. Simao legði Portugal á odda, tá 18 minuttir vóru farnir av dystinum. Ungarn var væl við í fyrra hálvleiki, men í øðrum hálvleiki setti Portugal tingini uppá pláss. Tá eitt korter var eftir økti Bruno Alves til 2-0, og fimm minuttir seinni staðfesti Simao portugisiska sigurin. Portugal hevur nú eitt stig meira enn Svøríki, og portugisar taka ímóti Malta á heimavølli, so tað skal eitt risastórt undur til, um Svøríki skal vinna annað plássið í bólkinum. Sama kvøldið tekur Svøríki ímóti Albania.



## Danmark til HM

Danmark og Svøríki spældu landsdyst nummar 102 millum londini bæði í Parkini í Keypmannahavn leygarkvøldið. Tað eydnaðist aftur Danmark at knógva arvafíggindanum, eins og í Stokkhólmi sigraðu danir 1-0. Sigursmálið skeyt Jakob Poulsen góðar 10 minuttir undan leikloki. Rómurin var stórur í Parkini aftaná dystin. Talan verður um tað fjórða endaspælið hjá Danmark í søguni. Danmark var við til HM í 1986, 1998 og í 2002. Morten Olsen fer í søguna, sum tann fyrsti danski venjarin, sum hevur ført danska landsliðið til eitt HM-endaspæl tvær ferðir.

### Kyndil-Neistin 29-24 (14-12):

# Kyndil vildi meira

**Grannauppgerðin í Havn gjørdist intens og spennandi, men Kyndil var betra liðið, og teir grønu vunnu eisini ein uppiborinn sigur**



jakup@sosialurin.fo
Jákup Mørk

Kollektivið hjá Kyndli var sterkari enn einstaklingarnir hjá Neistanum. Tað var fremsta niðurstøðan av grannauppgerðini á Hálsi, har Kyndil prógvaði, at hóast liðið ikki telur heilt so sterkar profilar, sum Neistin ger, so hava teir eitt hondbóltslið, sum er í minsta lagi líka sterkt.

Stílurin sunnudagin var tann eyðkendi, tá Kyndil er best. Nógv ferð á álopsspælinum og eina knallharað verju, sum ferð eftir ferð steðgaði skotsterku bakketuni hjá Neistanum. Og við einum Erlendi Johannesen í málinum, sum sjáldan hevur spælt betur enn tað sama, tóku teir púrasta pippið frá bláu mótstøðuni.

### Høvdu meira í sær

Kontanti spælistílurin kostaði fleiri útvísingar, og tvær ferðir mátti Kyndil spæla við fýra móti seks. Men hetta tók ongan tíð liðið niður. Partvíst tí eftiverandi spælararnir bara stríddust tað meira, tá menn vóru úti, men eina mest tí spælið hjá Neistanum ofta gekk alt ov seint, og tí megnaðu ikki at spæla tunt hóast yvirtalið.

Eina løtu í seinna hálvleiki var tó líkt til, at Neistin kundi sveiggja seg upp hóast alt. Hans Áki Dal-Christiansen hevði fingið sína triðju útvísing, og tí var ein týðandi partur av Kyndils-verjuni burtur. Um sama mundi fekk Neistin, sum hevði verið aftan fyri allan dystin, togað seg upp á 21-21, og fagnaðurin í bláu leguni var øgiligur, tá Kyndils-venjarin tveitti grøna kortið á borðið.

Men veruligi upptúrurin varð av ongum. Tvørtur ímóti, so setti Kyndil alt so ruddiliga upp á pláss næstu løtuna. Áðrenn teir bláu reiðiligа vistu av, stóð 28-22 á talvuni, og tá var alt ov seint til at gera nakað sum helst.




Kyndil var støðugt betra liðið í dystinum móti Neistanum. Her sæst konsentratiónin lýsa úr Høgna Klein-Olsen, meðan David Edvardsen hyggur at

Mynd: Álvur Haraldsen

### FAKTA

**Kyndil-Neisin 29-24 (14-12)**
**10 min:** 6-4
**20 min:** 11-9
**40 min:** 16-15
**50 min:** 21-21
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Bárður Johannesen 9, Josef Abrahamsen 7(1), Høgni Klein 3, Ken Zachariassen 3, Torvald Abrahamsen 2, Kristoffur Kristoffersen 2, Høgni Klein-Olsen 1, Julian Johansen 1, Hans Áki Dal-Christiansen 1
**Neistin:** Birgir Poulsen 7, David Edvardsen 6(1), Ingi Olsen 5, Heini Hanusarson 4, Jugosalv Djumic 2, Finnur Hansson 1
**Brotskøst:** Kyndil 1, Neistin 1
**Útvísingar:** Kyndil 8, Neistin 4
**Dómarar:** Andreas F. Hansen & Eyðun Samuelsen

### Toppurin í trunka

Sigurin hjá Kyndli ber við sær, at toppurin á stigatalvuni nú er saman í mest sum einum trunka.

Enn er sjálvandi langt á mál, áðrenn finalistarnir til FM-kappingina verða funnir, men spælið hjá Kyndil vísti akkurát tær dygdir, sum áður hevur borðið felagið fram til fleiri heiti.

Í mun til so ofta fyrr tykist Kyndil eisini at vera í rætta gearinum frá byrjan hesaferð, og kunnu teir halda dampinum á leið haruppi, sum hann var sunnudagin og fyri eini viku síðani, er eingin orsøk at halda, at Kyndil ikki verður við heilt frammi, tá vit koma fram til kappingarenda.

### StÍF-VÍF 22-29 (8-14):

# So koppaðu strandingar

**Eftir at hava hótt við at bumba alla mótstøðu niður og norð kom StÍF so ruddiliga niður á jørðina, tá VÍF vitjaði**



jakup@sosialurin.fo
Jákup Mørk

StÍF mátti á heimavølli leggja rygg tilsítt fyrsta tap, tá VÍF vitjaði sunnudagin.

Eftir at hava vunnið tryggan sigur á Kyndli og H71 kom StÍF nevnliga so ruddiliga niður á jørðina sunnudagin.

VÍF byrjaði sum eitt óløgið, og eitt heilt korter skuldi ganga, áðrenn strandingar høvdu skotið sítt fyrsta mál. Tá høvdu gestirnir longu funnið meskarnar seks ferðir,tann munurin gjørdi, at talan ongan tíð gjørdist um nakran spennandi dyst.

Restina av dystinum helt VÍF nevnliga rimmarfast um leiðsluna. Fyrstu longu løtuna av seinna hálvleiki var enntá lagt upp til veruligt sorl, men seinastu tíggju minuttirnar varð fóturin sleptur nakað á speetaranum, soleiðis at StÍF hóast alt fekk pyntað nakað um úrslitið.

Fyrstu umførini hevur annars sæð út til, at StÍF við útlendsku stórskjúttunum hevur verið í nakað nær námind serflokki, men tann fatanin varð so ruddiliga broytt hesaferð. Vestmenningar prógvaðu, at teir so sanniliga eisini eru partur av føroyska hondbóltsoddinum, og tí er longu nú lagt upp til ein spennandi hondbóltsvetur á manssíðuni.

### FAKTA

**StÍF-VÍF 22-29 (8-14)**
**10 min:** 0-6
**20 min:** 3-10
**40 min:** 8-19
**50 min:** 12-23
**Málskjúttar**
**StÍF:** Gabriel Stanciu 6, Mortan Hansen 6(2), Cristian Preda 5, Jógvan Berg 4, Borgar Danielsen 1
**VÍF:** Sámal Joensen 7(2), Bjarti Hansen 6, Regin Joensen 5, Agnar Joensen 5, Áki G. Olsen 3, Joen Pauli Høgnesen 1, Sámal Jákup Djurhuus 1, Magnus Muller 1
**Brotskøst:** StÍF 5, VÍF 2
**Útvísingar:** StÍF 3, VÍF 5
**Dómarar:** Hans Thomassen & Hanus Kúrberg